# BÝRÁÐSFUNDUR

**Dagfesting:** 08.03.2017 kl. 19:00

Nevndarlimir:: Dennis Holm
Eydis Kjærbo
Kirstin Strøm Bech
Levi Mørk
Anna Brattaberg Samuelsen
Eyðbritt Krosslá
Dánjal Bjarkhamar
Erhard Joensen

Vara limir: Jens Sivar Djurhuus

Ikki møtt: Conrad Gaard Joensen

Nevndarskrivari: Petry Joensen


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | | |
| 19/17 | 17/00049-2 | Kommunustýrisskipan fyri Vágs kommunu 2017 - 2020 | 2 |
| 20/17 | 14/00065-8 | Broyting av umsókn | 2 |
| 21/17 | 17/00057-2 | Kristina Vilhelm umsókn um sundurbýti mart. nr 607a | 3 |
| 22/17 | 17/00078-2 | Rock Trawldoors umsókn um viðkan av leigulendinum á Oyrinum við 120m2 | 3 |
| 23/17 | 17/00079-2 | Umsókn frá eigararum av smáttinum við Laksá søkja um frávik í byggisamtykt | 4 |
| 24/17 | 17/00053-2 | Val av umboðum til aðrar nevndir | 5 |

## 19/17 Kommunustýrisskipan fyri Vágs kommunu 2017 - 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vágs Býráð | 30.01.2017 | 1/17 | 17/00049-2 |
| 2 Vágs Býráð | 08.03.2017 | 19/17 | 17/00049-2 |

Sambært kommunustýrislógin §5 skal kommunustýrið áseta nærri reglur um síni stýrisviðurskifti í eini kommunustýrisskipan. Uppskot og broytingaruppskot til kommunustýrisskipan skulu hava tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 dagar millumbili.

**Vágs Býráð 30. januar 2017:**
Einmælt samtykt til fyrru viðgerð.

**31. januar 2013:**
Skriva er inn í kommunustýrisskipanina hvussu stýrið fyri Bú- og heimatænastuna í Suðuroynni skal veljast.

**Vágs Býráð 08. marts 2017:**
Einmælt samtykt til seinnu viðgerð.

## 20/17 Broyting av umsókn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 3 Tekniska- og umhvørvisnevndin | 14.02.2017 | 10/17 | 14/00065-8 |
| 4 Vágs Býráð | 08.03.2017 | 20/17 | 14/00065-8 |

Søkt verður vegna eigarnar um at broyta útvendugu bjálvingina til flamingo í staðin fyri steinull, sum fyrra byggiloyvið varð givið eftir, harumframt er bjálvingin betra í mun til upprunaligu tekningar.

Mælt verður til at loyva hesum og at broyta dagfestingina av byggiloyvinum samsvarðandi, við grundarlagi í dagfestingini av nýggju tekningunum.

27 nov. 2015:
Nýggj umsókn er komin við broytingum viðvíkjandi minni krøvur um brunatrygd millum hæddir og íbúðar-eindir. (Umsitingin kannar málið fyri fundin 1. Des. 2015 og gevur tilmæli).

**Tekniska nevnd 22. juni 2015:**
Einmælt samtykt at játtað umsóknini.

**Tekniska nevnd 01. december 2015:**
Tekniska nevnd metir at VK kan ganga umsóknini á møti, um innsatsleiðarin kann taka undir við hesum.

**Tekniska- og umhvørvisnevndin 14. februar 2017**:
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá TD

**Vágs Býráð 08. marts 2017:**
Einmælt samtykt.

## 21/17 Kristina Vilhelm umsókn um sundurbýti mart. nr 607a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska- og umhvørvisnevndin | 14.02.2017 | 15/17 | 17/00057-2 |
| 2 Vágs Býráð | 08.03.2017 | 21/17 | 17/00057-2 |

TD hevur móttikið Mál til ummælis frá Umhvørvisstovuni viðv. sundurbýti av matr.nr 607a.

Eigari av ognini matr. nr. 607a í Vági eru: Kristina Vilhelm og Johanna Maria Vilhelm 2/3

**Servituttar sum hvíla á matr. nr. 607a í Vági, eru hesir:**
1 03.11.1964 Skjøl um forkeypsrætt

Umhvørvisstovan fer at biðja Vágs Kommunu um ummæli sambært
**§ 20 í Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m. sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 82 frá 25. mai 2009.**

TD mælir til at loyvið til sundurbýti verður givið, samb. galdandi býar- og byggisamtyktir fyri Vágs Kommunu.

**Tekniska- og umhvørvisnevndin 14. februar 2017:**
Einmælt samtykt at loyva sundurbýti samb. umsókn.

**Vágs Býráð 08. marts 2017:**
Einmælt samtykt.

## 22/17 Rock Trawldoors umsókn um viðkan av leigulendinum á Oyrinum við 120m2

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havna- og Vinnunevndin | 13.02.2017 | 5/17 | 17/00078-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.02.2017 | 20/17 | 17/00078-2 |
| 3 Vágs Býráð | 08.03.2017 | 22/17 | 17/00078-2 |

Rock Trawldoors søkir um viðkan av lendinum á Oyrinum við 120m$^2$ til at hava leyst tilfar standandi uttan fyri teirra framleiðsluhøll.
TD mælir til at loyvið verður givið samb. galdandi reglur fyri leigu á havnarøkinum, kr. 20,-/m$^2$

**Havna- og Vinnunevndin 13. februar 2017:**
HN hevur einmælt samtykt at fylgja tilmælinum frá Tekniskudeild.
HN einmælt viðmælt at fakturin 4028 fyri leigugjald verður avskrivaður.

**Fíggjarnevndin 20. februar 2017:**
Einmælt samtykt at játta at víðka leiguøkið. Málið verður lagt fyri býráðið.
Málið viðv. faktura 4028 - mál 16/00365 verður viðgjørd á komandi fundi í Fíggjarnevndini og er ikki partu av hesum málið.

**Tekniska deild 3. mars 2017:**
Hans í Líðini hevur umvegis teldupost sent Vágs kommunu ynskið um at víkan av lendi á Oyrinum til 240 m$^2$ til at hava leyst tilfar standandi uttan fyri teirra framleiðsluhøll. Tekniska deil mælir til at loyvið verður givið samb. Galdandi samtykt fyri leigu á havnaøkinum kr. 20,- / m$^2$.

**Vágs Býráð 08. marts 2017:**
Einmælt samtykt.

## 23/17 Umsókn frá eigararum av smáttinum við Laksá søkja um frávik í byggisamtykt

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska- og umhvørvisnevndin | 14.02.2017 | 19/17 | 17/00079-2 |
| 2 Vágs Býráð | 08.03.2017 | 23/17 | 17/00079-2 |

Eigararnir av smáttinum við Laksá søkja um loyvið til frávik í byggisamtyktinum, sum staðfesta at smátturnar skulu verða svartmálaðar, hava hvít vindeygu og tekjan skal verða svørt.

- Vindeygu eru hvít og tekjan er svørt, men søkt verður um loyvið til at mála smátturnar reyðar "Nordic classic red"

**Tekniska- og umhvørvisnevndin 14. februar 2017:**
Einmælt samtykt at loyva til frávik samb. umsóknina, treyta av at allar smáttunar verða einslittar.

**Vágs Býráð 08. marts 2017:**
Einmælt samtykt.

# 24/17 Val av umboðum til aðrar nevndir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vágs Býráð | 30.01.2017 | 4/17 | 17/00053-2 |
| 2 Vágs Býráð | 08.03.2017 | 24/17 | 17/00053-2 |

Í teimum føstu nevndunum sum í minst lagið skulu verða tvinnar, kunnu bert sita kommunustýrislimir.
Vágs býráð hevur valt at skipa seg við 6 føstum nevndum. Allar føstu nevndirnar eri mannaðar við trimum umboðum, enn vantar at velja síðsta umboði í ungdómsnevndina.

Sambært kommunustýrisskipanini §36 er ásetur at kommunustýrið kann seta serstakar nevndir at taka sær av einstøkum málum ella at ráðgeva kommunustýrinum, fíggjarnevndini ella aðrari fastari nevndi.
Kommunustýrið ásetir nærri reglur bæði um virksemi, virkisskeið og manning av serstøkum, ráðgevandi nevndum.
Kommunustýrið skal somuleiðis sambært viðtøkum fyri aðrar stovnar uttan fyri kommunu velja umboð.

Av viðhefta skjali sum er “brot úr kommunustýrisskipanini fyri Vágs kommunu” framgongur hvar enn vantar at velja umboð.
Tað sum er markað við bláum vísir hvar tað frammanundan er avgjørt hvør manar nevndina, tað sum er markað við gulum vísir hvar umboð skulu veljast.

**Vágs Býráð 30. januar 2017:**

### Skattakærunevndin fyri Suðuroy:
Borgarstjórin skjótur upp at velja Boga Mortensen sum lim og John Hendrik Holm sum varalim, Jens Petur Brattalíð sum lim og Jan Joensen sum varalim.
Einmælt samtykt.

### Barnaverndarnevndin:
Væl av limum verður útsett til komandi fund. Kannað verður eftir um tað er serstøk krøv til hvørji útbúgving umboðini skulu hava.

### Sjálvsognarstovnurin Eldrasembýlið í Vági:
Einmælt samtykt at sosiala nevnd (Kirstin, Levi og Eyðbritt) verða val í nevndina.

### Stýrið fyri Ellis- og Røktarheimið í Suðuroy:
Borgarstjórin skjótur upp at velja Annu Brattaberg Samuelsen sum lim og Kristin S. Bech sum varalim.
Einmælt samtykt.

### Ferðslunevndin:
Borgarstjórin skjótur upp at velja Dánjal Bjarkhamar, Levi Mørk, Eyðbritt Krosslá og Kristin S. Bech.
Einmælt samtykt.

## Skúlastýrið fyri Vágs skúla:

Borgarstjórin skjótur upp at velja Eydis Kjærbo og Annu Brattaberg Samuelsen sum limir.
Einmælt samtykt.

## Ferðavinnan í Suðuroy:

Borgarstjórin skjótur upp at velja Annu B. Samuelsen sum lim og Kirstin sum varalim.
Erhard Joensen skjótur upp at velja Marin H. Gaardlykke sum lim.
Kirstin S. Bech skjótur upp at velja Annu B. Samuelsen sum lim og Marin H. Gaardlykke sum varalim.
Atkvøtt bleiv sum seinasta broytingar uppskotið fyrst. Samtykt við 7 atkvøðum fyri, Erhard Joensen og Jens Sivar atkvøddi ikki.
Atkvøtt var síðani um fyrra broytingaruppskotið, tvær atkvøður vóru fyri (Erhard og Jens Sivar) og 7 ímótur. Sostatt er seinna broytingaruppskotið samtykt.
Anna limur og Marin varlimur.

## Valnevndin:

Einmælt samtykt at sitandi valnevnd heldur áfram.

## Johanna TG326:

Einmælt samtykt at velja Jógvan Krosslá.

## Sjálvsognarstovnurin Vágs Brand- og Bjargingarstøð:

Borgarstjórin skjótur upp at velja Kirstin S. Bech.
Einmælt samtykti.

## Vágs sóknar Forminnisfelag/Forminnissavnið:

Borgarstjórin skjótur upp at velja Eyðbritt Krosslá
Einmælt samtykti.

## Sjálvsognarstovnurin Páls Høll:

Borgarstjórin skjótur upp at velja Levi Mørk og Eyðbritt Krosslá
Einmælt samtykt.

## Háskúlin í Suðuroy:

Eydis Kjærbo skjótur upp at velja Dennis Holm verður umboð
Og skjótur Dennis Holm upp at Dánjal Bjarkhamar verður varalimur fyri seg og at Eydis Kjærbo er limur og Levi Mørk er hennara varalimur.
Einmælt samtykt

## Hegnssynsfólk fyri Vágs Kommunu:

Borgarstjórin skjótur upp at velja Fróða Mortensen, Suna Poulsen og Gunnvá B. Arnfinsdóttur í hesa nevndina
Einmælt samtykt.

## Umboð í Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy:

Borgarstjórin skjótur upp at velja Eydis Kjærbo í umboð fyri Vágs kommunu.
Einmælt samtykt.

## Ungdómsnevndina:

Borgarstjórin skjótur upp at velja Annu Brattaberg Samuelsen sum umboð í nevndina.

Jens Sivar Djurhuus skjótur upp at velja Erhard Joensen.
Atkvøtt var um broytingaruppskotið fyrst. 2 atkvøður vóru fyri (Erhard og Jens Sivar) 7 atkvøddi ímótur.
Síðani var atkvøtt um uppskotið hjá borgarstjóranum, 7 atkvødd fyri, Erhard og Jens Sivar atkvøddi ikki.

**3. mars 2017:**

Vágs kommuna tørvar at velja hesi umboð:

- 2 eyka umboð til Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy
- 1 lim og ein varalim til Barnaverndarnevndina
- 5 limir til Vágs Ítróttarráð
- 1 umboð í nevndina fyri Musikkskúlan

**Vágs Býráð 08. marts 2017:**
Sum eyka umboð til Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy verður skotið upp at velja Annu Brattaberg Samuelsen sum varalim fyri Dennis Holm og Kirstin Strøm Bech sum varalim fyri Eydis Kjærbo.
Einmælt samtykt.

Sum umboð í Barnaverndarnevndina verður skotið upp at velja Eyðbritt Krosslá sum lim og Eyðhild Mørk sum varalim.
Einmælt samtykt.

Sum umboð í Musikkskúlanevndina verður skotið upp at velja Sólrun Mohr.
Einmælt samtykt.

Sum umboð í Vágs Ítróttarráð verður skotið upp at velja Fróða Mortensen, Annu Brattaberg Samuelsen, Palla Augustinussen, Jón Pauli Olsen og eitt umboð fyri ítróttarlærararnir í Vágs skúla (sum tey tilnevna sjálvi).
Einmælt samtykt.

**FUNDURIN LOKIN KL. 21:00**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Dennis Holm | Eydis Kjærbo | Kirstin Strøm Bech |
| Levi Mørk | Anna Brattaberg Samuelsen | Eyðbritt Krosslá |
| Dánjal Bjarkhamar | Jens Sivar Djurhuus | Erhard Joensen |